# Miðbýurin er steindey



*Sjálvt um miðbýurin er steindeyður, so er lív í 76 ára gamla Simma Jacobsen, sum endaði kjakkvøldið um miðbýin í gjárkvøldið í Miðlahúsinum við at tríva í »Eitt sunnukvøld í plantasjuni«*

**Fleiri av panelluttakarunum róðu upp undir, at gongugøtan, frá Vaglinum niðan til ljóskurvarnar, eigur at gerast bilfrítt øki fyri at fáa lív í aftur miðbýin. Hetta var persónliga meiningin hjá borgarstjóranum, og Gilli Trónd fór víðari og mælti til, at bygd vórðu parkeringshús mitt inni í miðbýnum**

MIÐBÝURIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt stúgvandi fult Miðlahús var karmurin um ein kjakfund um miðbýin í Havn.

Startskotið til fundin var ein klumma, sum Rigmor Dam, blaðkvinna á Sosialinum hevði í einum vikuskiftisinnleggi, og sum hon læs upp at byrja við. Tó eftir, at Simme heilt spontant hevði framført ein sang um júst Havnina.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, var hin fyrsti í panelinum, sum fekk orðið. Hann viðgekk, at miðbýurin er mest sum steindeyður. Hinvegin vísti hann á, at uppgávan hjá býráðnum er at skapa karmarnar.

Í klummu síni fanst Rigmor Dam at nýggju brúgvasteinunum, sum eru lagdir á Áarvegin, men Heðin Mortensen segði, at neyðugt var við hesum slagi av steinum, tí einki annað heldur.

- Av tí at bilar koyra í gongugøtuni, er tað einki annað, sum heldur, segði Heðin Mortensen.

Hann helt annars, at býráðið hevði gjørt sítt til at hugna um við Speakers Corner og Tinghúsgarðinum. Men eitt er neyðugt, skal veruligt lív koma aftur í miðbýin.

- Gongugøtan má gerast bilfrí. Hetta er mín persónliga meining, tí tað eru ymsar meiningar um tað í býráðnum, segði Heðin Mortensen.

Hann segði, at roynt verður at gera Tórsgøtu til eina mentanargøtu. Við Miðlahúsinum, Gamla Reinsaríi, Margarinfabrikkini og Leikhúsinum Gríma.

Ætlanin er at gera eitt torg við borðum og stólum millum Miðlahúsið og Gamla Reinsarí, har fólk kunnu hugna sær. Og so skulu vit nú til at taka støðu til, um tað skal verða gangandi ella koyrandi út Undir Bakka, segði Heðin Mortensen.

Í dag er veruliga handilsgøtan í býnum Dr. Jacobsensgøta.

- Býráðið hevur broytt byggisamtyktina, so byggjast kann hægri nú, segði Heðin Mortensen.

## Smátt er gott

Ingigerð á Trøðni, leiðari av Kunningarstovuni í Havn, fekk síðani orðið. Miðbýurin er gamli býurin, har øll koma og øll fara úr aftur.

- Samstundis, sum vit ynskja at varðveita býin, sum hann var, vilja vit samstundis hava ein nútímans miðbý, segði Ingigerð á Trøðni.

Gongugøturnar og handilslívið er kjarnin í býnum, men Áarvegur og Niels Finsensgøta er ikki nøkur lívlig handilsgøta. Eisini hon metti, at Dr. Jacobsensgøta er veruliga handilsgøtan í býnum í løtuni. Hon róði eisini upp undir, at miðbýurin gjørdist bilfríur.

- Snuskutar húsafasadur og óendalig vegarbeiði eru ikki júst innbjóðandi fyri miðbýin. Hann manglar handlar, og bakarin er heldur ikki her longur, segði Ingigerð á Trøðni.

Hon hevur eina greiða definitión upp á, hvar sjarmin við miðbýnum er.



*Tveir at pallborðslutakarunum um miðbýin vóru, Gilli Trond og Elin Heinesen*